# Telefonbókin 2011

## Seinasta freist at lata inn broytingar til Telefonbókina 2011 er týsdagin 1. februar 2011

Í juni 2011 verður Telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar. Verandi og nýggj virki, handlar og stovnar, sum vilja nýta møguleikan at lýsa á Gulu síðum, skulu boða frá hesum – bæði um talan er um nýggjar lýsingar, ella um hildið verður áfram við teimum verandi.

### Hvítu síður

Týsdagin 1. februar 2011 er seinasta freist at lata inn broytingar til Hvítu síður í Telefonbókini 2011 (vanliga telefonyvirlitið).

**Prísir**

| | |
|---|---|
| Eykaupptøka | 62,50 kr. |
| Undirupptøka | 62,50 kr. |
| Undirstriking | 62,50 kr. |
| Búmerki | 3.750,00 kr. |

**Allir prísir eru við mvg.**



**Kontakt**
**kundaskraseting@ft.fo, tel. 80 80 14, faks 32 10 91**

### Gulu síður

Týsdagin 1. februar 2011 er seinasta freist at boða frá av nýggjum, um ein ynskir upptøku í Gulu síðum.

**Prísir**

| | |
|---|---|
| Eykaupptøka | 62,50 kr. |
| Undirupptøka | 62,50 kr. |
| Undirstriking | 62,50 kr. |
| Grafisk lýsing, grundgjald | 1.750,00 kr. |
| Innrammað lýsing, grundgjald | 1.250,00 kr. |
| Grafisk ella innrammað lýsing, fyri mm (min. 30 mm) | 37,50 kr. |

**Allir prísir eru við mvg.**



**Kontakt**
**lysingar@ft.fo, tel. 30 30 30, faks 30 30 31**

FØROYA TELE

SENDISTOVAN

# Stjóri til Landsverk

*Søkt verður eftir stjóra til Landsverk at byrja 1. mars ella skjótast til ber*

**Starvið**: Stjórin hevur evstu ábyrgd av stovninum og vísir beinleiðis til aðalstjóran í Innlendismálaráðnum. Saman við leiðsluni á stovninum leggur tú virksemið til rættis og setir yvirskipaði mál fyri øll arbeiðsøki. Harafturat hevur tú evstu ábyrgd av, at øll verklagsarbeiði hjá landinum verða væl frágingin, av fíggjarstýring, og at játtanir verða hildnar. Sum stjóri kemur tú at samstarva tætt við politisku skipanina. Tú kemur tí at hava ein týðandi leiklut í at mynda hetta samstarvið. Harafturat verður títt samstarv við vinnuna tætt, og er tað ein fortreyt, at hetta samstarvið er optimalt. Landsverk er ein týðandi stovnur í føroyska samfelagnum og gerast bygnaðarbroytingar ella aðrar broytingar neyðugar, skalt tú ganga á odda.

**Faklig førleikakrøv**: Tú setir fakliga støðið í hásæti og hevur høgan fakligan integritet. Tú hevur akademiska útbúgving eitt nú innan verkfrøði, búskaparfrøði ella løgfrøði. Royndir innan leiðslu er ein treyt. Harafturat er kunnleiki til fíggjarstýring ein treyt, meðan kunnleiki til byggi- og ráðgevingarvinnuna er ein fyrimunur. Harafturat er tað fyrimunur, um tú hevur leiðsluútbúgving.

**Persónlig førleikakrøv:** Tú hevur førleikar til at mynda stovnin úteftir, hevur framúr góð samskiftisevni og dugir væl at orða teg mótvegis starvsfólki, politisku skipanini, fjølmiðlum og almenninginum annars. Tíni samstarvs- og leiðsluevni eru av teimum bestu. Tú dugir væl við fólki og evnar at draga viðkomandi starvsfólk inn í avgerðir, men torir samstundis at skera ígjøgnum, tá tað er neyðugt. Somuleiðis skalt tú vera før/ur fyri at taka skjótar og sjálvstøðugar avgerðir. Tú varðveitir yvirlitið og sært yvirskipað upp á uppgávurnar, ið stovnurin varðar av. Tá støðan krevur tað, dugir tú eisini at fara niður í viðkomandi smálutir. Tær dámar væl at arbeiða undir trýsti, ert framsøkin og skjót/ur at seta teg inn í nýggj viðurskifti. Harafturat ert tú ágrýtin eftir at fáa sum mest burturúr virkseminum á stovninum og hevur ein jaligan hugburð mótvegis broytingum.

**Setanarviðurskifti:** Starvið er flokkað ájavnt við 38. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, og verður ein viðbót veitt, sum svarar til munin millum 38. og 39. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins. Tó er ikki talan um eitt tænastumannastarv. Eftirlønargjaldið er 15% av eftirlønargevandi lønini. Setanartreytir annars verða ásettar í sersáttmála.

**Umsóknir:** Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til runij@imr.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. februar 2011 kl. 16. Merk umsóknina „Stjóri". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra í Innlendismálaráðnum, á tlf. 558070 ella runij@imr.fo

*Við umleið 130 starvsfólkum er Landsverk ein av størstu landsstovnunum í Føroyum. Landsverk er undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar. Somuleiðis situr stovnurin fyri tilbúgvingarmálum á landi og sjógvi.*



www.imr.fo

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

SENDISTOVAN